# Noyddust at klippa takið av

**Tórshavnar Sløkkilið noyddist at klippa takið av einum bili fyri at fáa ein fastkleimdan bilførara leysan í sambandi við eitt ógvusligt ferðsluóhapp í Havn hósdagin**

FERÐSLUÓHAPP
*Terji Nielsen*



*Neyðugt var at klippa takið av bilinum fyri at fáa fastkleimda bilføraran leysan úr bilinum hjá sær*
*mynd: Jens Kr. Vang*

Seinnapartin hósdagin var eitt ógvusligt ferðsluóhapp á vegamótinum Tjaldursvegur/RC Effersøesgøta í Havn. Ein bilur, ið skuldi út av Tjaldursvegnum og út á RC Effersøesgøtu, koyrdi beint út fyri ein bil, ið kom niðan eftir RC Effersøesgøtu.

Stoyturin var harður, og síðan í bilinum, ið koyrdi út fyri, bleiv trýst inn.

**Sat fastkleimdur í næstan ein tíma**

Bilførarin bleiv fastur í bilinum, og neyðugt var at skera mannin leysan úr bilinum. Hetta tók drúgva tíð, og neyðugt var at klippa alt takið av bilinum. Í sambandi við ferðsluóhappi var eitt strekki av RC Effersøesgøtu stongt í nærum ein tíma í gjár, meðan arbeitt var við at fáa mannin leysan og rudda upp eftir óhappið.

Bilførarin á hinum bilinum var fluttur á sjúkrahúsið til kanningar, men bleiv útskrivaður aftur beinanveg

Fastkleimdi bilførarin varð eisini fluttur á sjúkrahúsið, men hvørki á sjúkrahúsinum ella á politistøðini ber til at fáa nakað at vita um støðuna hjá manninum. Bilurin hjá hesum manninum gjørdist vrak.




